# Vikuskifti

Nr. 162 • Vikuskiftið 27.–28. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Alternativar løgmannarøður um forsorg

Tinghellan s. 38–41

TING-HELLAN

# Evangelisering á motorsúkklum

## Umboð fyri evropeiska motorsúkklufelagsskapin Holy Riders vitja í hesum døgum í Føroyum í sambandi við fyrireikingar av kristiliga tiltakinum "Biker-meet", ið verður í Føroyum komandi summar



Holy Riders uttan fyri Havnar kirkju, f.v.: Ole Kristian Kjenes, presidentur í Holy Riders, Victor Carlsen, samskipari av ferðini í Føroyum, Per Aagaard Hansen, prestur í Biker-Church, og Vidar Johnsen, skrivari í Holy Riders

*Mynd: Jens Kristian Vang*




MC

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Holy Riders er ein kristin motorsúkklufelagsskapur, sum varð stovnaður í 1981. Felagsskapurin hevur sum endamál at breiða út evangeliið um Jesus í motorsúkklu-umhvørvinum í Evropa.

Teir umleið 400 limirnir í Holy Riders eru í øllum aldri og við ógvuliga ymiskari bakgrund, bæði menn og kvinnur. Holy Riders er ein av fleiri slíkum felagsskapum í Evropa.

Holy Riders møta til nógv ymisk motorsúkklu-treff, har teir seta upp tjøld og bjóða kaffi og fáa eitt prát við onnur motorsúkkluáhuga. Eisini hava tey kristiligan lesna og skipa fyri kristiligum bønarfundum og gudstænastum. Felagsskapurin samstarvar við aðrar motorsúkklufelagsskapir um ymisk tiltøk.

Ikki er neyðugt at eiga motorsúkklu fyri at vera limir í felagsskapinum. Limirnir skulu vera persónliga trúgvandi og hava tilknýti til eina samkomu ella kirkju. Fyri at fáa Holy Riders ryggmerki á jakkan, skal viðkomandi vera fyltur 19 ár og hava verið limur í minst eitt ár. Jakkin við ryggmerki er eins og ein uniformur.

Limirnir koyra alt frá enskum veteranmotorsúkklum til stórar Harley Davidson.

### Biker-bíblian

Holy Riders geva úr blaðið "Power" 5-6 ferðir um árið. Teir hava eisini sína egnu kirkju, Biker Church, og geva út eina "Biker-bíbliu" á fleiri ymiskum málum, ið verða lætnar ókeypis, tá teir m.a. vitja á MC-treffum.

Biker-bíblian byrjar við vitnisburðum frá fleiri persónum í motorsúkkluumhvørvinum, síðan kemur Nýggja testamenti í heilum líki. Aftast í bíbliuni eru so aftur ymiskar frásøgnir og lýsingar, sum eru við til at fíggja bóklingin.

Á sumri 2006 verður á fyrsta sinni hildið eitt kristiligt "Biker meet" í Føroyum. Í hesum sambandi er limir í Holy Riders á vitjan. Við á ferðini eru tveir norðmenn og ein dani: Ole Kristian Kjenes, presidentur í Holy Riders, Vidar Johnsen, skrivari, og Per Aagaard Hansen, mc-prestur í Biker-Church. Teir hava tvær motorsúkklur við sær og leigaðu eina frá Harley Davidson í Føroyum.

Hóskvøldið 26. august var eitt felag, undir Holy Riders í Noreg, stovnað í Føroyum við Victor Carlsen sum kontaktpersóni.

Møtir verða hildin sunnudagin 28. august í Kelduni í Skálafirði kl. 11.00 og í Evangeliihúsinum í Havn kl. 18.00, har Per Aagaard Hansen, prestur í Biker-Church talar, og øll eru vælkomin.